e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttaSosialurin kann eisini lesast á alnetinum: www.sosialurin.fo

# ÍF ætlar sær aftur í fremstu røð

*Í Fuglafirði ásanna tey, at grundarlagið skal finnast í lokala samfelagnum og ikki í fremmandum spælarum*

Fuglfirðingar vóru millum teir fyrstu, sum fóru undir nýggja kappingarárið. Tað gjørdu teir síðsta sunnudag, tá teir við at vinna sannførandi á 3. deildarliðnum hjá AB spældu seg víðari úr fyrsta innleiðandi umfarinum í kappingini um løgmanssteypið.

ÍF skal nú í vikuskiftinum spæla á útivølli móti Royn. Takið hjá fuglfirðingum er at spæla seg í bólkaumfarið, tí har verður mótstøðan væl størri, enn hon annars fer at verða í venjingardystum móti øðrum liðum. At mótstøðan í venjingardystunum er nóg góð hevur stóran týdning hjá ÍF, sum ætlar sær at vera við í kappingini um besta plássið í 2. deild.

Hugaligir
Í bólkaumfarinum í kappingini um løgmanssteypið, sum tað verður farið undir annan sunnudag, eru tey tíggju liðini í 1. deild sjálvskrivað. Fuglfirðingar halda, at teir áttu at verið millum tíggju tey bestu liðini í Føroyum, men tað eru teir ikki í løtuni. Tá KÍ vann FM heitið í síðsta umfarinum í fjør, fingu fuglfirðingar at vita, at tíðarskeiðið hjá teimum í bestu deildini var liðugt fyri hesa ferð.

Í heyst sá tað út til, at hesa ferð skuldi steðgurin hjá ÍF í næstbestu deildini vera longri, enn hann fleiri ferðir áður hevur verið. Fleiri spælarar boðaðu frá, at teir fóru at flyta til onnur feløg, og onkrir góvust at spæla.

Men eftir at Petur Mohr er komin at standa fyri venjingini, hevur áhugin verið alsamt vaksandi, og vit frætta úr Fuglafirði, at tað er ikki óvanligt, at tað eru einir 25–30 spælarar og venja. Fleiri av spælarunum, sum ætlaðu at sær at fara aðra staðni, eru framvegis í felagnum, og tað man ikki vera óhugsandi, at ÍF aftur komandi ár verður í 1. deild.

**Meiri miðvísir**
Týskvøldið hevði ÍF ársaðalfund. Á skránni var m.a. nevndarval. Nývald í starvsnevndini er Andrea Lervig. Hinir nevndarlimirnir eru Roy Róin, sum hevur verið formaður, Jón Nolsøe Olsen, Símun Fornagarð og Unn R. Petersen. Nýggja starvsnevndin hevur ikki skipað seg enn. Í fótbóltsnevndini var Sonni Jensen nývaldur. Umframt hann eru í nevndini Sigfríður Abrahamsen og Hildigarð Eliasen.

Á fundinum varð tosað nógv um, hvussu úrslitini hjá besta liðnum komandi árini kunnu gerast meiri støðug, enn tey hava verið. Tveir møguleikar vórðu nevndir. Annar er, at felagið fer at kappast við onnur feløg um føroysku spælararnar og fer út um landoddarnar eftir spælarum, og hin var, at felagið miðvíst fer at styrkja um ungdómsarbeiðið, soleiðis at líkindini gerast betri fyri, at bulurin á einum framtíðar1. deildarliði verður mannaður av fuglfirðingum.

Í fjør varð roynt at styrkja um ungdómsarbeiðið. Semja tykist vera um, at tað skal haldast fram við hesum arbeiðnum. Ein av uppgávunum hjá nevndunum verður at stinga út í kortið fyri nøkur ár fram í tíðina, og at fáa fleiri fólk uppí, sum vilja og eru før fyri at taka ábyrgd í praktiskum uppgávum.

At tað verður arbeitt við hesum vil ikki siga tað sama sum, at eingir fremmandir spælarar komandi árini fara at verða á liðnum hjá ÍF – um tað verður í 1. ella í 2. deild – men tað vil heldur siga, at málið er, at liðið skal gerast meiri støðugt og harvið minni tengt at, um hjálp fer at fáast aðra staðni frá ella ikki.

ÍF hevur oftast havt eitt hampuliga gott unglingalið, men tey seinnu árini hava ikki so nógvir nýggir spælarar fingið møguleikan á besta liðnum. Í fjør komu onkrir framat, og longu í fyrsta dystinum í ár vóru onkrir nýggir spælarar við í hópinum.

JH

# Meistararnir komu víðari

*Fótbóltur, UEFA Champions League: Hóast tað enn restar eitt leikumfar í seinna bólkaspælinum, er ein mynd av fjórðingsfinalistunum um tekna seg, og mikukvøldið megnaðu verandi meistararnir eisini at tryggja sær víðari luttøku*

Jákup Mørk

**Bólkur A**
**Porto kiksaði**
Barcelona, sum longu hevur tryggjað sær víðari luttøku í kappingi, tryggjaði sær eisini oddasessin í bólkinum, tá teir mikukvøldið vunnu 3-1 á Hertha Berlin.

Tað var annars týska liðið, sum legði seg á odda, tá Ante við høvdinum legði bóltin í spanska málið.

Leiðslan helt sær tó ikki leingi, tí lítla løtu seinni sendi miðvallarin, Xavi, sum avloysti Guardiola hetta kvøldið, bóltin í netið til 1-1.

Eftir hetta hevði Barcelona so at siga alt spælið, og tað var einans eitt frálíkt avrik frá Kiraly í týska málinum, sum forðaði fleiri málum.

Beint eftir steðgin, eydnaðist tað tó Gabri at skora, tá hann av miðjum vølli setti beina kós móti málinum, har hann eisini megnaði at leggja bóltin.

Móti endanum av dystinum eydnaðist tað Patrick Kluivert, sum fram til tá hevði brent eina ófatuliga rúgvu av málmøguleikum, at økja upp í 3-1, og so var leyst og liðugt hjá spanska stórfelagnum.

Í hinum dystinum í bólki A kundi Porto tryggja sær víðari luttøku, um teir megnaðu at fáa trý stig burtur úr heimadystinum móti Sparta Prag.

Alt byrjaði eisini eftir ætlan, tá Costa eftir eitt korter skoraði til 1-0. Nakað inni seinna hálvleiki økti Capucho upp í 2-0, og so skuldi ein hildið, at málið var avgreitt, men kekkiska liðið gav kortini ikki upp.

Eitt korter fyri leiklok minkaðu teir um munin, tá Lokvenc slapp leysur móti málinum, og tá vísarin á klokkuni var farin um teir 90 minuttirnar, eydnaðist tað teimum eisini javna, tá Fukal hevði seinasti fótin á eini álopsroynd.

Við javnleikinum varðveitti Sparta Prag møguleikan at koma í fjórðingsfinalurnar, men Porto má framvegis metast sum favorittur at fylgja Barcelona á leiðini. Barcelona er fremst í bólki A við 13 stigum, Porto hevur 7 stig, Sparta Prag 5 og Hertha Berlin hevur 2 stig. Í seinastu dystunum skal Porto á vitjan í Berlin, meða Sparta Prag á heimavølli fær vitjan av Barcelona.

**Bólkur B**
**Meistararnir víðari**
Verandi meistararnir úr Manchester United, tryggjaðu sær luttøku í fjórðingsfinalunum, tá teir mikukvøldið vunnu 3-1 á italska Fiorentina.

Tað byrjaði tó alt annað enn gott hjá enska liðnum, tá Gabriel Batistuta eftir eitt korter sendi eitt dundurskot í netið aftan fyri Mark Bosnich, sum nú aftur var at síggja í enska málinum.

Lítla løtu senni hevði Andy Cole tó fingið javnvág í aftur, og beint fyri leiklok eydnaðist tað liðskiparanum, Roy Keane, at skora, tá hann heilfluktaði bóltin í netið, eftir at Henning Berg fyrst hevði skallað bóltin á tvørstongina.

Í seinna hálvleiki hevði enska liðið so at siga alt spælið, og serliga eftir at Rositto fekk reytt kort, eftir at hava sparka Yorke niður aftan í frá, lá væl fyri hjá teimum.

Møguleikarnir trutu heldur ikki, og at enda eydnaðist tað Yorke at skalla bóltin í netið úr stuttari fjarstøðu, eftir at besti maðurin á vøllinum, Ryan Giggs, hevði lagt innfyri úr vinstru.

Valencia, sum er nr. 2 í bólki B, megnaði á útivølli at vinna 4-1 á franska Bordeaux, og nú tørvar spanska liðnum bert ein javnleik í seinasta heimadystinum móti Manchester United fyri at koma víðari.

Fyrra umfarið gekk javnt á, men Valencia fekk tó lagt seg á odda, tá verjuleikarin, Miroslav Djukic.

Seinni hálvleikur var bert tríggjar minuttir gamal, tá verjuleikarin hjá Bordeaux, Saveljic, varð rikin av vølli, og upp á eftirfylgjandi brotssparkið kundi Mendieta gera tað til 2-0.

Sylvian Wiltord megnaði at minkað um munin nakað seinni, men kortini gjørdist tað Valencia, sum fekk seinasta orðið í dystinum, tá Gonzalez og Sanchez skoraðu til 3- og 4-1 móti endanum av dystinum.

Manchester United er nú á odda í bólki B við 12 stigum, Vanlencia hevur 9 stig á øðrum plássi, meðan Fiorentina á triðja plássinum hevur 7 stig. Niðast er Bordeaux, sum bert hevur fingið 1 stig.

# Børge nýggjur kappingarstjóri

*Sveinbjørn Dánjalsson verður kappingarstjóri hjá kvinnunum og Karl Vidtfeldt hjá ungdómsdeildunum*

Dánjal Andreasen, sum tey seinnu árini hevur verið formaður í kappingarnevndini hjá FSF og kappingarstjóri í øllum deildunum ynskti at sleppa úr starvinum, tá nevndirnar í Fótbóltssambandinum í síðstu viku vóru valdar og síðani hava skipað seg. Jens Erik Magnussen hevur verið næstformaður í kappingarnevndini og kappingarstjóri, tá formanninum hevur borist frá, men nú er Jens Erik Magnussen vanligur nevndarlimur í kappingarnevndini.

Nýggjur formaður í kappingarnevndini er Børge B. Hansen, og Óli Holm er næstformaður.

Frammanundan hevur tað verið soleiðis, at ein og sami persónur hevur verið kappingarstjóri í øllum deildunum, men nú er hetta øðrvísi. Børge B. Hansen er kappingarstjóri hjá teimum vaksnu mannfólkunum, Sveinbjørn Dánjalsson er kappingarstjóri hjá kvinnunum, og Karl Vidtfeldt er kappingarstjóri hjá yngru deildunum.

Sveinbjørn Dánjalsson er eykalimur í starvsnevndini.

Bøgre B. Hansen er farin úr landsliðsnevndini, og Dánjal Andreasen er nýggjur í landsliðsnevndini. Í fíggjarnevndini eru formaðurin í Fótbóltssambandinum og formenninir í kappingarnevndini og landsliðsnevndini. Tað vil við øðrum orðum siga, at Børge B. Hansen er komin í fíggjarnevndarsessin, sum Dánjal Andreasen hevur sitið í. Hinir fíggjarnevndarlimirnir eru Torleif Sigurðsson og Jens Erik Magnussen.

JH



# Steypakappingin í hondbólti

*Steypakappingin í hondbólti hjá teimum 10 ára gomlu enda›i á Skála 11. mars. Kappingin var skipa› solei›is, at eftir innlei›andi dystirnar leiktu 4 li› seg til eitt finaluumfar*






*hjá dreingjunum gjørdist StÍF A nr. 1*



*hjá gentunum gjørdist Neistin B nr. 1*



*Neistin B nr. 2*



*VÍF A nr. 2*



*H71 A nr. 3*



*StÍF A nr. 3*





*og StÍF B nr. 4*



*og Stjørnan nr. 4*